# aftur

liga støðugar omanfyri 50 krónur fyri kilo, men hava onkur tíðarskeið verið beint niðanfyri.

Í fjør var prísurin á portiónum hin hægsti nakrantíð, tá miðalprísurin var heilar 68,45 krónur fyri kilo.

Tølini vísa, at feskur laksur hevur verið ein rættiliga dominerandi partur av útflutninginum, men í 2006 kom broyting í.

Útflutningsvirðið er sum heild fallið sera nógv seinastu fýra árini, men virðið av portiónum úr laksi er ikki fallið.

Í 2006 var útflutningsvirðið á portóinum enntá hægri enn virðið av feskum laksi, men hetta kemst eisini av, at nøgdirnar av feskum laksi vóru munandi minni í 2006 enn undanfarin ár.

### Sílini áhugaverd

Fesku sílini gjørdu seg eisini rættiliga galdandi í samlaða útflutningsvirðinum í fjør, og ein orsøk til hetta er, at russiski marknaðurin er í stórari menning. Helmingurin av føroysku framleiðsluni av sílum fór nevniliga á russiska marknaðin, har góðir møguleikar eru fyri hesi vøru.

Rusland er eisini ein áhugaverdur marknaður fyri laksavørum, og potentialið á hesum marknaði er stórt.

Av samlaða útflutningsvirðinum í fjør stóðu portiónir úr laksi fyri 41%, feskur laksur fyri 28%, fryst síl 14%, meðan fesk síl og frystur laksur stóðu fyri hvør sínum 7%. Síðan stóðu avskurður og annað fyri 3%.

### Útseting av smolti

Tá ið útsetingin av fiski var upp á tað mesta, vórðu 16 miljónir smolt sett út.

Í 2003 og 2004 fall útsetingin sera nógv, tá hervilig kreppa var í alivinnuni. Í 2005 kvinkaði talið nakað uppeftir aftur, og í 2006 kom útsetingin sum nevnt upp á 8 miljónir fiskar.

Í ár verður útsetingin 9,7 miljónir fiskar, og í 2008 og helst nøkur ár fram fer útsetingin at liggja um eini 10 miljónir smolt.



*Av samlaða útflutningsvirðinum hjá føroysku alivinnuni í fjør stóðu portiónir úr laksi fyri 41%, sum er ein størri prosentpartur enn áður*

**Føroya Havbúnaðarfelag er áhugafelag hjá alarum, bæði á sjógvi og landi.**

**Uppgávan er at menna vinnuna í samstarvi við limir, myndugleikar og stovnar, ið varða av alivinnuni.**

**Felagið hevur sæti og felags umsiting við vinnufeløg, sum húsast í Vinnuhúsinum.**

**Í nevndini: Ragnar Joensen, formaður, Atli Gregersen, Grímur Rasmussen, Bogi Jacobsen og Frímund Hansen**



*- Eitt tað veikasta liðið í føroysku sjúkutilbúgvingini innan alivinnu eru innfluttu rognini. Vit hava einki veruligt eftirlit, sum kann tryggja okkum, at vit ikki renna okkum í sama trupulleika við smittum, sum onnur lond dragast við, sigur Ragnar Joensen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag*

# Lívfiskastøðin kundi verið karantenustøð

**Føroya Havbúnaðarfelag heldur, at eitt tað veikasta liðið í føroysku alivinnuni í dag, nú vinnan annars hevur fótað sær aftur, eru rognini, sum verða keypt úr útlandinum. Vinnan heldur, at smittuvandi lúrir aftanfyri henda innflutning**

ALING
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Alt kynsbótaarbeiði innan laksaframleiðslu í Føroyum helt uppat fyri umleið tveimum árum síðum og meginparturin av rognunum, sum alivinnan brúkar, verða keypt frá ymiskum veitarum uttanlands.

Í 2001 fingu føroyskir alarar loyvi til at innflyta rogn, og í dag verður bert ein minni partur keyptur frá Fiskaaling, sum kortini fer at bjóða út rogn eina tíð aftrat.

Kynsbótaarbeiði helt uppat, tá myndugleikarnir gjørdu av at taka stuðulin burtur, og uttan stuðul metir vinnan, at føroysku rognini í framtíðini helst høvdu verið tvífalt so dýr at keypa sum tey útlendsku.

Kynsbótaarbeiði er kostnaðarmikið, og tað er eingin sum sigur, at vit duga hetta betur enn aðrir, sum kortini gera stórt kynsbótaarbeiði.

### Sjúkuvandi lúrir

Men aftanfyri innflutningin av rognum lúrur eisini ein ótti fyri sjúkum.

Føroya Havbúnaðarfelag heldur nevniliga, at eitt tað veikasta liðið í føroysku sjúkutilbúgvingini innan alivinnu eru innfluttu rognini, har eingi serlig krøv í dag eru um eftirlit, sum kann byrgja uppfyri smittu.

Formaðurin í felagnum, Ragnar Joensen, sigur, at tey stúra fyri, at føroyska alivinnan soleiðis kann koma at dragast við somu trupulleikar, sum vinnan í okkara grannalondum dregist við.

- Vit hava tí sett í verk eitt útgreiningararbeiði til tess at geraeina lýsing av rognveitarunum, haðani føroyska alivinnan keypir rognini. Veitararnir eru fleiri í tali, og vit eru áhugaði at vita, hvussu ymisku framleiðararnir arbeiða. Frágreiðingin, sum næstan er liðug, er ætlað sum grundarlag undir framtíðar avgerðum á hesum øki, sigur Ragnar.

### Karantenustøð

Formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag heldur, at ein máti at byrgt uppfyri sjúku, sum kann standast av innfluttum rognum, kundi verið at skipað Lívfiskastøðina í Skopun sum karantenustøð í framtíðini.

- Tá kundu innfluttu rognini og fiskurin, sum kemur undan, gingið í Skopun, til vissa er fingin fyri, at fiskurin ikki er fongdur við smittu.

Ragnar Joensen sigur, at Føroya Havbúnaðarfelag viðger henda spurningin og fer at koma til eina niðurstøðu um, hvat felagið fer at mæla til at gera.

- Tað eru tey, sum siga, at tryggast er at keypa rognini úr Íslandi. Onkur sigur, at tey eru verri, onnur siga, at tey eru ikki verri, men ongar veruligar kanningar eru gjørdar, sum staðfesta hetta. Skulu slíkar kanningar gerast neyvar, er neyðugt, at fiskurin, sum kemur undan íslendsku rognunum, gongur undir somu umstøðum sum fiskurin, ið kemur undan rognunum, sum keypt verða eitt nú í Noregi – heilt frá byrjan til enda, sigur Ragnar Joensen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag.